# Góða SøluRás 2002

Eins og undanfarin ár er sølustevnan SøluRásin 2002 fyriskipað av Ítróttarfeløgunum á Skála og á Strondum. Tað vil siga, at Skála ítróttarfelag, Skála Róðrarfelag, Stranda Ítróttarfelag og Ungmannafelagið Strálan standa saman um at skipa fyri stevnuni.

Endamálið við stevnuni er at fáa pening til vega, sum skal nýtast til raksturin hjá hesum fýra feløgunum.

SøluRásirnar, sum hava verið seinastu árini, hava verið serstakliga væl eydnaðar. Fleiri enn 30 fyritøkur hava sýnt fram og tey bæði seinastu árini vóru fleiri enn trý túsund atgongumerki seld.

Tí hava vit aftur í ár gjørt okkara ítarsta fyri at øll - bæði framsýnarar og gestir - skulu vera so væl nøgd við stevnuna sum tilber.

Vit fara her at takka øllum framsýnarum, lýsarum, teimum sum undirhalda, teimum vitjandi og øllum tykkum mongu, sum hava hjálpt til at gera tað møguligt at hava eina stevnu sum hesa.

Við ynskjum um eina væl vitjaða og góða sølustevnu á SøluRásini 2002. Vælkomin!

**Fyrireikingarbólkurin**



## Skála Ítróttarfelag

Skála Ítróttarfelag, sum varð stovnað í 1965, er í dag eitt fótbóltsfelag burturav. Felagið er umboðað í øllum yngru deildunum. Harumframt hevur felagið eisini lið í 1. og 3. deild hjá monnum.

Formaður er Kurt Rasmussen



## Stranda Ítróttarfelag

StÍF, sum felagið eitur í dagligari talu, varð stovnað í 1948 og man tí vera eitt av teimum elstu feløgunum í landinum. Felagið er hondbóltsfelag burturav, og hevur lið í øllum deildum, bæði hjá kvinnum, monnum, gentum og dreingjum.

Formaður er Andras Danielsen.



## Skála Róðrarfelag

Skála Róðrarfelag varð stovnað í 1993 og er róðrarfelag burturav. Felagið hevur luttikið í kappróðri við tveimum bátum síðani stovnanina. 5-mannafarinum Svani og 10-mannafarinum Skálabátinum.

Formaður er Dan Petersen.



## Strálan

Ungmannafelagið Strálan varð stovnað í 1989. Felagið hevur tikið lut í kappróðri við 6-mannafarinum Stráluni síðani 1991. Umframt róðurin hevur felagið eisini badminton á skránni

Formaður er Anfinn Gærdum.



Brenderup

*Viðfestisvognar*



Vitjið okkum á SøluRásini á Skála. Vit selja landsins bestu og biligastu viðfestisvognar.

***Sertilboð á SøluRásini***

***P/f Hansen***

FO-490 Strendur

Tel. +298 447142




*Vælkomin*

*á*

*bás nr. 27*

**Palettin**

*N. Finsensgøta 9a*

*FO-100 Tórshavn*

*Tel./Fax. +298 318150*



Snældan

FO-490 Strendur

Tel. +298 447154